KLETT ADVOKATAR
JULIANNA KLETT · JÓHAN J. LAMHAUGE

SØLUFRAMSÝNING

# LISTAVERK Í BÚNUM EFTIR JANUS KAMBAN

Hósdagin 12. november kl. 14.00 byrjar í Listaskálanum sølan av verkum í búnum eftir Janus Kamban.

Søluframsýningin fevnir um listaverk sum Janus Kamban átti av listafólkum sum t.d. Mikines, Ingálvi av Reyni, Ruth Smith, Steffani Danielsen, Jóannisi Kristiansen, Thomas Arge, Bent Restorff, William Heinesen o.m.ø. Harumframt eru høgmyndir, sum Janus Kamban hevur gjørt.

Sølan fer fram á tann hátt, at verkini eru virðismett, og boð og møgulig yvirboð kunnu gevast skrivliga. Søluframsýningin endar leygardagin 14. november kl. 15.00.

Búgvið tilskilar sær rætt til ikki at selja verk, har møgulig boð eru niðarfyri virðismetingina.

Verkini eiga at verða goldin á konto í Eik Banka, +181-1530420, og heintað móti kvittan mánadagin 16. november kl. 14.00.

**Julianna Klett, eksekutor**
*julianna@klett.fo*

**Klett Advokatar**
Bringsnagøta 21
Postboks 62
110 Tórshavn
www.klett.fo

Bringsnagøta 21 · Postboks 62 · 110 Tórshavn · Telefon (298) 311744 · Telefaks (298) 318844 · www.klett.fo




Hetta er m.a. søgan um hvussu tað er, at hava liva og virka sum føroyingar í danska samfelagnum í meira enn ein hálvan mansaldur. Hetta er eisini søgan um, at vaksa upp á Tvøroyri ella sum smádrongur at fara til Vestmanna at vitja familju og kenningar. Hvussu tað var at fara blaðungur til sjós við føroyskum trolara.

Seinni í bókini eru søgur frá lívinum sum fangavørður í Danmark í meira enn 30 ár. Nógv hevur **Ólavur á Heygum** upplivað í teimum ymsu fongslunum.

Hann sigur frá hendingum og persónum úr hesum heilt serliga umhvørvinum og um tey viðurskiftið, sum eru galdandi millum starvsfólkini og fangarnar. Bókin er lætt skrivað við nógvum myndum og kundi verði ein góð jólagáva.

Bókin hevur verið ummæld í Sosialinum 25. og 29. september, Fængelsfunktionæren og Dagbladet, Tåstrup red. Ólavur kan hittast á **+45 22 79 06 67** ella **heygum_baad@yahoo.dk**

EINANS 175 KR

Tú kanst ogna tær bókina, fyri 175 kr., íroknað postgjøld, vid at flyta á konto í Danske Bank, reg.nr. 3191 og kontonr. 4514073902.

Sosialurin
Sosialurin
i

Røktar- og umlættingarheimið
Lágargarður

# Starvsfólk til Røktar-og umlættingarheimið Lágargarð

## Fysioterapeutur til eldraøkið:

Í samstarvi við Nærverkið og Tórshavnar kommunu, er farið undir verkætlan at samskipa og menna tilboðini til eldri heimabúgvandi borgarar, og tey, sum búgva á eldrabúðstovnum í Tórshavnar kommunu.

**Lýst verður eftir avloysara fyri:**
- Fysioterapeut frá 1. januar 2010 til 31. juli 2010 við tilvísing til Lágargarð, á lønarbrøki 1,0

Høvuðsuppgávan hjá fysioterapeutinum er at fremja og varðveita heilsu og fyribyrgja sjúku, til tess at brúkarin longst møguligt kann klára seg sjálvur.

Endamálið við verkætlanini er at gagnnýta tilfeingið av terapeutum, sum arbeiða á røktarheimunum og skipa soleiðis fyri, at flest møguligir eldri borgarar, heimabúgvandi og tey, sum búgva á røktarheimi, fáa gagn av venjingartilboðunum, sum eru í Tórshavnar kommunu. Sjey ergo- og fysioterapeutar arbeiða saman í toymi, har høvuðsuppgávan er at venja eldri fólk, undirvísa røktarstarvsfólkið, vegleiða í nýtslu av hjálpartólum, og at skjalfesta árinini av venjingini.

**Førleikakrøv:**
- Ert útbúgvin fysioterapeutur
- Hevur royndir innan eldraøkið
- Kann leggja til rættis og fremja venjingarætlanir
- Kann arbeiða sjálvstøðugt og í toymi
- Kann undirvísa starvsfólki innan arbeiðsrørslur
- Kann vegleiða um hjálpartól

**Vit bjóða tær:**
- Eitt dynamiskt og fleksibult arbeiðsumhvørvi við nógvum avbjóðingum og menningarmøguleikum
- Verða við til at bróta upp úr nýggjum, og soleiðis hava møguleika at seta títt persónliga fingramerki á toymið og avrik tess

**Starvs- og setanarviðurskifti:**
Eftir sáttmála við Fysioterapeutfelag Føroya og Fíggjarmálaráðið. Tú kemur at starvast í ergo-/fysioterapiini á Lágargarði, á Tjarnargarði og heima hjá borgarunum.

Meiri fæst at vita um starvið og verkætlanina við at venda sær til:
Marjun Poulsen, toymisleiðara
tlf. 35 67 95
marjunp@torshavn.fo

## Køksrøktarstarvsfólk:

Lýst verður eftir einum køksrøktarstarvsfólki/assistenti við prógvi til køkin at byrja 1. januar 2010 í lønarbrøki 1,0.

Køkurin á Lágargarði ger dagliga døgverður til heimabúgvandi pensionistar, umframt til búfólk, dagstovnsfólk, starvsfólk á stovninum og aðrar stovnar.

**Førleikakrøv:**
- Ert útbúgvin køksrøktarstarvsfólk
- Kann arbeiða sjálvstøðugt
- Góð samstarvsevni

**Vit bjóða tær:**
- Eitt dynamiskt og fleksibult arbeiðsumhvørvi við nógvum avbjóðingum og menningarmøguleikum
- Møguleika at nýta venjingarhøli í okkara fysioterapi

**Starvs- og setanarviðurskifti:**
Sambært sáttmála millum Køks- og føðslufelag Føroya og Fíggjarmálaráðið.

Meira fæst at vita um starvið við at ringja til Petru Jespersen, økonomu, á tlf. 35 67 81.

## Røktarstarvsfólk:

Lýst verður eftir heilsurøktara/heilsuhjálpara í skiftandi vaktum til Handarastovu í lønarbrøki 0,5 frá 1. januar 2010. Á Handarastovu eru 16 búpláss fyri minnisveik.

**Førleikakrøv:**
- Útbúgving sum heilsurøktari ella heilsuhjálpari
- Royndir innan eldraøkið er ein fyrimunur
- Kann arbeiða sjálvstøðugt
- Góð samstarvsevni

**Vit bjóða tær:**
- Eitt dynamiskt og fleksibult arbeiðsumhvørvi við nógvum avbjóðingum og menningarmøguleikum
- Møguleika at nýta venjingarhøli í okkara fysioterapi

**Starvs- og setanarviðurskifti:**
Eftir sáttmála við Fíggjarmálaráðið og avvarandi yrkisfelag.
Meira fæst at vita um starvið við at ringja til Mai Dahl, deildarleiðara á tlf. 35 67 94

Umsókn til størvini við neyðugum prógvi, autorisatión og møguligum tilmælum skal sendast til:

**Lágargarð · att. Meta av Fløtum · Stoffalág 84 · Postboks 1188**
**FO-110 Tórshavn · Umsóknarfreist: 7. desember 2009**